# Atli P. Dam

Atli P. Dam ella Atli, sum hann vanliga varð nevndur, var frá ungum árum stak vælskikkaður til eina politiska starvsleið. Politikkin hevði hann fingið inn við móðurmjólkini. Hann var hóast ungur á aldri ein av næstu ráðgevum hjá faðirir sínum P.M. Dam. Men hóast politiska bakstøðið valdi hann sær starvsleið sum verkfrøðingur og arbeiddi sum kunnugt uttanlands, tá heitt varð á hann um at koma heim til føðilandið at taka við landsstýrissessi eftir, at Javnaðarfloksins fremsti hugmyndafrøðingur, Villi Sørensen, landsstýrismaður brádliga var deyður. Atli tók skjóta og greiða avgerð, játtaði at taka á seg ábyrgdina, vælvitandi, at játtanin merkti annað og meira enn at sita í landsstýri, tað ið eftir var av valskeiðinum. Hann átók sær byrðina meira av pliktkenslu enn av huga. Hann visti jú betur enn nakar av sínum javnaldrum, hvat tað kostaði at standa á odda fyri flokki við tungari politiskari ábyrgd.



Tá Atli var vorðin landsstýrismaður kom hann skjótt at sýna framúr leiðaraevni, áræði og dugnaskap. Við sínum óvanliga sterku innlivingarevnum dugdi hann sera væl at seta seg inn í tey manga fløktu og torgreiddu málini. Hann megnaði eftir stuttari tíð at kunna seg við politiska umhvørvið í Føroyum. Atli nútímansgjørdi Javnaðarflokkin og hann fór við síni ómetaligu arbeiðsorku undir at nútímansgera Føroyar. Eingin einstakur politikkari hevur sum Atli Dam í nýggjari tíð sett sín dám á føroyska samfelagið. Politiskt var hann javnaðarmaður av tí gamal slagnum, kendi politiskt seg mest í ætt við teir, sum skaptu norðurlendska vælferðarsamfelagið, Krag, Palme og Gerhardsen.

Sum samráðingarmaður var Atli P. Dam tikin úr leikum. Hann stóð á odda í samráðingunum við ES og átti æruna bæði av, at tað eydnaðist Føroyum at sleppa undan limaskapi og av, at Føroyar fingu eina sera góða avtalu. Sum samráðingarleiðari var hann opin, erligur, gløggur, áhaldandi - dugdi betur enn nakar at síggja, nær hann skuldi halda fast og nær stund var at slaka. Hansara framúr analytisku evni komu honum til góðar í teimum politisku støðum, ið høvdu hansara størst áhuga nevniliga í samráðingum við útlendskar samráðingarnevndir. Her var hann so at siga á heimavølli. Soleiðis koma hann aftur av eini samráðingarferð fyri og aðri eftir við úrslitum, har hvørt var betur enn annað. Atli vann sær stóra virðing hjá mótstøðumonnum so væl sum hjá viðhaldsmonnum. Hann vann virðing við síni ómetaligu vitan, sínum sterku argumentatiónsevnum, sínum víðagitna áhaldni og við sínum reinlyndi. Hann dugdi sum fáur at síggja møguleikarnar í eini samráðingarstøðu. Hann sá, hvat ið var møguligt og hann gloymdi ongantíð, at í eini samráðingarstøðu var neyðugt at hava virðing fyri sínum mótparti og at lata eins væl og at taka. Vit kundu lagt afturat, at Atli mangan í samráðingum vann sær persónlig vinarløg, ið vardu fyri lívið, nakað sum kom øllum til góðar bæði á ein og annan hátt.

Sum løgmaður og sum flokksformaður spardi Atli seg ikki, samstundis sum hann mangan var í hørðum andgletti. Tað vil so vera. Hetta nervaði hann at síggja til lítið. Vit hava tó mangan lyndi til at gloyma, at politikkarar eru menniskju sum vit, og einhvør, sum hevur fylgt við í politikki, dugdi at síggja, hann mátti svølgja mangan beiskan bita. Men hann kendi sum fáur treytirnar og gav seg sum tann stóri politikkari og leiðari, hann var, undir hesar treytir og virkaði ótroyttiliga undir hesum mangan beisku politisku korum longri enn annar í løgmansembætinum.

Sum menniskja var Atli vinsælur, trúgvur og hjálpsamur. Hann dugdi væl at bera seg, var eitt tignarligt umboð fyri sítt land og sítt fólk. Hann var ættkærur og vinsælur, men kundi fyri teimum, sum ikki kendu hann, tykjast eitt sindur afturhildin við hvørt. Hetta komst av, at hann í veruleikanum innast inni var eitt sindur smæin, samstundis sum hann var bæði stórtøkin og hásinnaður. Við deyða Atla er ein epoka av í nýggjari føroyskari søgu. Føroyar hava mist ein stóran son, sum gav landi og fólki alla sína ómetaliga orku og øll síni góðu evni. Hugur okkara leitar til næstringar og tey, sum stóðu honum nær. Vit lýsa frið yvir minnið um hugsjónarmannin og stríðsmannin Atla P. Dam.

**Sosialurin**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$



**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.